# Gunnar sterkastur á einkultstartinum




*Eisini teir smáu kappaðust í súkkling á Sundalagsstevnuni. Her eru tað teir fremstu í bólkinum 6-8 ár, sum standa á sigurspallinum*

**Súkklukapping var á skránni á Sundalagsstevnu, og hesaferð var tað í einkultstarti, at tey vaksnu kappaðust**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Fríggjakvøldið á Sundalagsstevnuni, skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri súkklukaping fyri vaksin og børn.

Tey yngru børnini koyrdu samlaðstart har øll byrja samstundis, og tey eldru børnini, teir vaksnu og unglingarnir koyrdu einkultstart, har ein og ein fer avstað í senn.

Teinurin ið koyrdur var, var frá skúlanum í Hvalvík og niðan í Saksunardal. Teir vaksnu og unglingarnir koyrdu 7,5 km móti Saksun, vendu har um ein keylu og koyrdu so aftur til Hvalvíkar. Børnini koyrdu eina rutu uppá 1 km. Tey koyrdu 0,5 km niðan í Saksunardal og oman aftur til Hvalvíkar. Yngsti bólkur koyrdu teinin einaferð, tey í árganginum koyrdu ´93-´95 koyrdu tríggjar ferðir og bólkurin árg. ´90-´92 koyrdi teinin 5 ferðir.

Veðrið var ikki av tí allarbesta. Tað var nógvur vindur, kalt og tað byrjaði at sirma eitt sindur tá kappingin byrjaði.

Tað var sera tungt at koma niðan móti Saksun, av tí at so nógvur vindur var ímóti. Men heimaftur gekk sera skjótt fyri seg.

Hjá unglingunum var lagt upp til eina spennandi kapping millum Torkil Veyhe, sum vann á Eystanstevnu, og Bergur Johansen sum vann á Norðoyastevnu. Teir skuldu súkkla 15 km einkultstart, og hava teir ikki kappast móti hvør øðrum í hesi grein í ár. Men tá avtornaði vann Torkil Veyhe hjá unglingunum við 16 sekundum.

Í bólkinum hjá dreingjum árg. '90 til '92 hendi eitt lítið óhapp. Ketan hjá Sigmund Olsson slitnaði, men hóast tað kláraði hann at koma við í kappingina aftur við einari læntari súkklu og vinna á Niels Christiansen.

Hjá teimum vaksnum gjørdist Gunnar Dahl-Olsen sannførandi nummar eitt við 3 minuttum og 8 sekundum aftur til nummar tvey sum gjørdist Sverri Mohr Edvinsson. Eli J. Christiansen gjørdist nummar trý, nummar fýra bleiv Beinir Rasmussen og eitt sindur óvæntað gjørdist Krisjan Guttesen vinnarin á Norðoyastevnu og nummar tvey á Eystanstevnu nummar fimm.

## Úrslitini frá kappingini:

**Bólkur: Vaksin**
**Einkultstartur 15 km**

| Nr. | | Tíð | |
|---|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 23:21 | min |
| 2 | Sverri Mohr Edvinson | 26:29 | min |
| 3 | Eli J. Christiansen | 26:35 | min |
| 4 | Beinir Rasmussen | 28:06 | min |
| 5 | Krisjan Guttesen | 28:52 | min |
| 6 | Palle Melciorsen | 30:19 | min |
| | Esmar Joensen | Útgingin | |

**Unglingar**
**Einkultstartur 15 km**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | 28:59 | min |
| 2 | Bergur Johansen | 30:15 | min |
| 3 | Dánjal Michalsen | 33:20 | min |

**Bólkur: Árg. '90 til '92**
**Einkultstartur 5 km**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sigmund Olsson | 12:51 | min |
| 2 | Niels Christiansen | 13:54 | min |
| 3 | Njál Jensen | Útgingin | |

**Bólkur: Árg. 93-95 á kapsúkklu**
**Einkultstartur 5km**

| Nr. | | Tíð | |
|---|---|---|---|
| 1 | Finnur Mellemgaard | 14:01 | min |
| 2 | Harlad Joensen | 18:11 | min |

**Bólkur: Árg. 93-95 á Fjallasúkklu**
**Samlaðstart 3 km**

1 Jógvan Mellemgaard
2 Fróði Olsen

**Bólkur: Árg. 96-98 Dreingir**
**Samlaðstart 1 km**

1 Krisjan Johannesen
2 Jóanis Albert Nielsen
3 Tóri Nielsen

**Bólkur: Árg. 96-98 Gentur**
**Samlaðstart 1 km**

1 Hildur Poulsen

## Triathlon á Varmakeldu

**Leygardagin, 3. juli, verður triathlon kapping hildin í Fuglafirði**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Triathlonkapping verður á Varmakeldustevnuni í ár.

Kappingin verður fyri bæði kvinnur og menn, og teinarnir verða soleiðis at byrja verður við 400m svimjing, síðan verður súkkla 10km, og til síðst 3km renning.

Kappingin byrjar á sandinum heimanfyri Mentanarhúsið,og øll kappingin verður inni í bygdini.

Fyri at luttaka mugu luttakararnir hava antin vátdrakt ella froskmannadrakt.

Vinnararnir ( 1-2-3) í hvørjum bólki fáa heiðursmerkir, og kappingin verður bólka soleiðis:

Kvinnur, 15ár og yngri
Kvinnur, 16ár og eldri
Menn, 15ár og yngri
Menn, 16ár og eldri

Sagt verður frá fyrireikarunum, at tilmelding til kappingina eigur at verða gjørd í seinasta lagi 1. juli.

## Framúr byrjan til Føroyar

Evropameistara kappingin í Bridge, verður í hesum døgum leikt í Malmø. Trý tey fyrstu umførini vóru leikt í gjár 20. juni.

Liðið hjá okkum í opna ræðnum fekk eina framúr byrjan við at vinna 20-10 móti Íslandi, 19-11 móti Týsklandi og spæla javnt 14-16 móti Onglandi Góða føroyska spælið hevur viðført at Føroyar liggja sum nummar seks við 53 stigum.

**Top 10:**

| | |
|---|---|
| Póland | 69 |
| Italia | 64 |
| Turkaland | 64 |
| Norra | 62 |
| Russland | 58 |
| Føroyar | 53 |
| Týskland | 53 |
| Svørríki | 53 |
| Wales | 53 |
| Belgia | 49 |

Damulandsliðið, ið eisini luttekur í kappingini fekk eisini eina góða byrjan, tær taptu 11-19 móti Italia og spældu síðani javnt móti norra. Tær liggja á 16. plássinum og eru frammanfyri lond sum Danmark og Ísland.

**Føroyar nr. 44 av 111**

Ein nýggjur altjóðar styrkilistið er júst gjørdur. Á honum sæst at Føroyar hava tikið seg nógv framm. Av teimum 111 londunum, sum er á listanum eru Føroyan nú nummar 44. Tað eru serliga tey framúr úrslitini Føroyar høvdu til seinasta NM, ið gera góðan mun.



# Enn ein nullloysn í Klaksvík

**Hóast vágbingar restaðu fleiri av føstu monnunum, so eydnaðist tað VB at halda tætt í Klaksvík, har heimaliðið enn eina ferð vísti, at teir hava stórar trupulleikar**

KÍ-VB
*Jóannes Hansen*




*Fyri sættu ferð í ár spældi KÍ javnleik. Hesaferð var tað ímóti VB í Klaksvík, og dysturin endaði málleysur*

Tað ber illa til at rokna við øðrum hjá klaksvíkingum. Sunnudagin sóu teir í illfýsna høgættarveðrinum teirra lið spæla fyri fimtu ferð á heimavølli í landskappingini í ár. Og teirra lið fór fyri fjórðu ferð av heimavøllinum, eftir at hava verið partur av javnleiki.

Vágbingar høvdu onkra ferðina møguleika at skjóta mál. Men tað var einki at ivast í, at teir vóru meiri fegnir enn mótstøðumenninir um málleysa javnleikin. Fyritreytirnar hjá VB vóru einki serligar. Fýra teirra, sum upprunaliga vóru millum ellivu teir bestu, vóru ikki førir fyri at spæla í Klaksvík. Ein teirra var Mindaugas. Hann var í álopinum fyrstu løtuna, men tað haltaði í orðsins sanna týdningi hjá honum, og áðrenn fyrra umfarið var hálvrunnið, var hann noyddur at fara av vøllinum.

Nýggi maðurin var Hans Allan Niclassen, og hann hevði bæði dygst undan steðginum og stutt eftir steðgin stórar møguleikar at gera mál, men tað eydnaðist ikki. Seinni hevði Palli Augustinussen ein góðan møguleika, men Jákup Mikkelsen bjargaði meistarliga væl.

### Órudduligt

Henda vitjanin hjá VB í Klaksvík fer ikki í søguna sum ein av teimum best spældu. Báðir partar gjørdu nógv persónlig mistøk, og tað kom ikki so ofta fyri, at upplagdir málmøguleikar spurdust burturúr.

VB miðvøllurin arbeiddi nógv, og Milan Kuljic vísti enn eina ferð, at hann er ein av teimum bestu — um ikki tann besti — av øllum miðvallarunum í landskappingini. Tað mesta hjá vágbingum gekk fyri seg við honum sum miðdepli, og í miðverjuni vóru Eyðun Jacobsen og Anders Sørensen sannir knassar. Ofta varð roynt við longum sendingum til Birgir Jørgensen, men tað var sjáldan, at hann fekk tamarhald á, og tá ið tað endiliga eydnaðist, so vóru heimamenninir um hann beinanvegin.

Uppspælið hjá KÍ var ikki nógv øðrvísi, enn tað hevur verið undanfarnu ferðirnar í ár. Í onkrum førum hava teir verið meiri ágangandi, enn teir hava verið aðrar ferðir. Hesa ferð vóru teir ikki so ágangandi, sum teir vóru síðsta partin av tíðini ímóti HB. Tað gekk eisini rúm tíð, áðrenn áskoðararnir tóku seg saman at geva teimum tann stuðulin, sum tað plagar at verða roknað við, at KÍ skal eiga á heimavølli.

KÍ fekk ikki spælið at hanga rættuliga saman. Í nógvum førum varð sparkað úr verjuni og fram til álopsmenninar, og tá er tað torført hjá bóltspælarunum á miðvøllinum. Onkrir glottar vóru, tá ið miðvallararnir góvu sær stundir til at spæla eitt tvey og at stinga fram ímillum og út í borðini, men málmøguleikarnir vóru ikki serliga nógvir.

Eyðun Klakstein royndi tvær ferðir við høvdinum móti málinum hjá Bjarna Johansen. Aðru ferðina sendi hann úr eitt sindur spískum í tvørtræið, og hina ferðina tveitti hann seg fram í tómrúmið, men stútarin úr lutfalsliga góðari støðu fór við síðuna av málinum.

Eftir innlegg gjørdist Jacob Bymar púra leysur mitt fyri málinum, men úr fimm metra fjarstøðu stútaði hann akkurát har, sum Bjarni Johansen stóð, og so var tann møguleikin burtur. Atli Danielsen hevði eisini eina góða roynd við høvdinum ímóti VB málinum, men tað segði tað sama.

Síðstu løtuna varð Erling Fles settur inn í KÍ álopið. Hann hevði nógva orku og legði nógv fyri, men tað spurdist einki mál burturúr, og tað gjørdi tað heldur ikki, tá ið unglingaspælarin Julian Samuelsen fekk møguleikan.

Dystargongdin kundi ivaleyst havt verið øðrvísi, um tað í 1. hálvleiki hevði eydnast Ova Nysted við høvdinum at stýra bóltinum í VB málið, eftir at hornasparksinnlegg var komið innfyri. Men bólturin fór skeivu megin stólpan.

Fyritreytirnar hjá VB vóru harvið betri, og tað vóru tær alla tíðina. Vágbingar kundu havt tiltuskað sær øll stigini, men teir vóru fegnir um javnleikin. Hjá klaksvíkingum er tað ikki sørt møtimikið og lítið kveikjandi, at teir eru meistarar í javnleikum. Í uppteljingini telur tað ikki nógv, og KÍ er framvegis nærri botninum, enn teir eru toppinum.

### FAKTA

**KÍ-VB 0-0**
**KÍ:** Jákup Mikkelsen — Jan Andreasen, Niclas Niclassen (Marek Wierzbicki, 77.), Ove Nysted, Harley Bertholdsen — Eyðun Klakstein, Jan Joensen (Julian Samuelsen, 86.), Atli Danielsen, Símun Joensen — Leon Bjartalíð (Erling Fles, 77.), Jacob Bymar
**Gult kort:** Eyðun Klakstein
**VB:** Bjarni Johansen — Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Jákup Olsen — Palli Augustinussen, Jón Pauli Olsen, Milan Kuljic, Poul N. Poulsen (Mikael í Lágabø, 68) — Birgir Jørgensen, Mindaugas (Hans Allan Niclassen, 28./Hartmann Hansen, 88)
**Gult kort:** Mortan úr Hørg

## Djordjevic lagdur undir skurð

**Jugoslaviski miðverjin hjá KÍ sleit hælsinuna leygardagin, og hann verður neyvan at síggja á vøllinum aftur í ár**

KÍ SKAÐI
*Jóannes Hansen*

Aleksandar Djordjevic verður ikki førur fyri at spæla fótbólt aftur í ár. Leygardagin var hann á 2. deildarliðnum hjá KÍ, sum á heimavølli megnaði at vinna 4-3 ímóti B71, ið annars hevur staðið seg væl.

Aleksandar Djordjevic, sum verður 36 14. juli, noyddist av vøllinum, tí hann var skaddur. Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi varð staðfest, at tað er hælsinan, sum er farin. Djordjevic skuldi leggjast undir skurð í gjár. Tað verður roknað við, at tríggir mánaðir í besta føri skulu ganga frá tí, at hælsinan er skurðviðgjørd, og inntil tað kann hugsast um at venja aftur. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað í besta føri fer at vera komið fram ímóti kappingarenda, tá ið jugoslavin aftur verður førur fyri at bjóða seg til venjingar.

Djordjevic kom til Klaksvíkar í 2001. Tað var Tomislav Sivic, sum tá var venjari hjá KÍ, ið fekk hann at hjálpa KÍ. Royndi maðurin, sum hevur roynt seg á hægsta støði í Jugoslavia og eisini hevur spælt í Europa Cup, ætlaðist at vera álopsstyrkur hjá KÍ. Seinni hevur hann tó fyri tað mesta spælt í miðverjuni.

Aleksandar Djordjevic hevur higartil skorað seks mál í landskappingini fyri KÍ. Hann skoraði tey øll í 2001. Aleksandar er búsettur í Klaksvík. Hann er giftur við Joan Midjord Joensen, sum nú eitur Joan Midjord Djordjevic. Hon er spælstýrari hjá Stjørnu kvinnunum og man vera ein tann besti kvinnuligi hondbóltsspælarin í landinum.